## Tómt stadion til 100.000

Vandin fyri svínakrími hevur av álvara rakt mexicanskan fótbólti. Um vikuskiftið spældu America og Tecos á risastóra Aztec-stadion, sum millum annað hevur hýst tveimum HM-finalum. Men smittu-vandin bar við sær, at myndugleikarnir bannaðu áskoðarum at koma til dystin, sum Tecos vann 2-1. 100.000 áskoðarar rúmast annars á Aztec-stadion.



## Ein venjara um vikuna

Fyri triðju ferð í tríggjar vikur skal fótbóltslandsliði hjá Iran hava nýggjan venjara. Ali Daei fekk sekkin, tá landsliðið tapti týðandi dyst í HM-undankappingini herfyri, og eftirmaður hansara, Mohammed Maylikohan, segði sjálvur upp eftir bara eina viku – og ongan dyst – sum venjari. Nú er Afshin Ghotbi settur sum landsliðsvenjari, og so er spurningurin, hvussu leingi hann sleppur at sita í sessinum.

# Nýtt met frá Bjørk

**Bjørk Herup Olsen úr Bragdið setti nýtt rutumet á teininum til Flaggdagsrenningina!**

RENNING
*Tíðindaskriv*
*post@sosialurin.fo*

Aftaná hugnaligu løtuna við røðu og horntónleiki á Vaglinum í Havn var spenningurin øgiligur uttanfyri gamla Apoteki undan startinum til 23´tjúgundu flaggdagsrenningina, fleiri enn 700 luttakarar høvdu melda seg til á www.renn.fo, og er tað met, og fyrireikararnir siga at umleið 600 gjøgnumførdu renningina.

### Fleiri profilar við

Fleiri av stóru profilunum í heimligu rennikappingunum vóru sjálvsagt tilmeldaðir, og stóðu teir og trippaðu á málinum til starturin sum var stundisliga kl.16:00, har veteranurin Óli Olsen sum vant saman við luttakarunum og áskoðarum stýrdi niðurteljingini frá 10 - 0.

Teir fyrstu løgdu øguligani út, og at hjá monnunum vóru tað serligani Andrias Hansen og Sam Vang úr Bragdið, Guttorm Sørensen úr Treysti, og Gudmund Joensen úr Triathlon felagnum sum vildu nakað meira enn tey flestu, teir fylgdust, og skiftust at verða fremstir, teir fyrstu kilometrarnar.

### Bjørk gjørdi bart!

Hjá kvinnunum eru tað serligani tær báðar Bragdakvinnurnar Bjørk Herup Olsen og Súsanna S. Sørensen, sum tey flestu mundu verða spent uppá hvussu tað mundi fara at ganga hjá, og skjótt sást at Bjørk vildi tað sum ongin onnur kvinna hevur megna, ikki enn í øllum førum, og nær er ilt at siga, men hon baði vann og setti nýtt rutumet, eitt satt bragd av ungu Bragdakvinnuni.




*Bjørk Herup Olsen stóð fremst við startin, og ikki óvæntað helt hon sær í oddinum allan vegin*

### Úrslitini nøkulunda sum væntað

Hjá monnunum endurtók Guttorm Sørensen bragdið frá í fjør at vinna, og var tíðin umleið 35 sekund skjótari enn í fjør, og var tað við Sam Vang úr Bragdið, sum í byrjanini var plágaður av livurhøgg, sum kom sum nr.2 og Gudmundur Joensen sum nr.3 á mál.

Andrias Hansen kom sum nr. 4 á mál, og virkaði hann eisini sjónliga troyttur aftaná at hava runni í Paris Marathon fyri bara umleið 14 døgum síðani við tíðini 2t42 minuttir, sum eisini er 3 ella 4 besta føoyska marathontíð nakrantíð, eitt satt bragd av unga Andriasi, meira um hetta seinni!

Tað var av besta veðri meðan sjálv renningin var, og hevur tað allarhelst eisini ávirkan á góðu luttøkuna, men bert ein tíma undan startinum oysregnaði, men tað gekk alt uppá stás, og komu allir luttakararnir á mál meir og minni troyttir.

# Gocart-snillingurin av Toftum

**Bara níggju ára gamli Ari Hansen av Toftum ger um seg í gocart-kappingum niðri, har hann í løtuni er við í kappingini um sælendska meistaraheitið. Væntandi fer hann eisini at kappast um danska meistaraheitið**

KAPPKOYRING
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Hóast sín unga aldur, hevur níggju ára gamli Ari Hansen av Toftum longu gjørt vart við seg sum gocart-kappkoyrari. Teir kønu siga, at hann hevur sera góð evni, og hóast kappingarneytarnir venja fleiri ferðir um vikuna og kenna breytirnar út og inn, gevur hann teimum ein skarpan gang.




*Ari Hansen avmyndaður saman við hollendska Formel 1-koyraranum, Jos Verstappen, sum sjálvur byrjaði við at koyra gocart, tá hann var átta ára gamal*

Um vikuskiftið var Ari við í fyrsta av fimm umførum í kappingini um sælendska meistaraheitið, og har gjørdist hann nummar fýra av teimum seks, ið kappaðust. Og var tað ikki, tí hann var óheppin í einum av innleiðandi umførunum henda dagin, so bilurin fór at snúra runt, var hann í minsta lagi endaður millum tríggjar teir fremstu.

– Tað vóru bara tvær yvirhálingar í kappingini hesa ferð, og Ari ætti tær báðar. Ari var annars nummar trý, tá hann fór at snúra runt, so høvdu vit brúkt meira tíð upp á gocartin, so vektjavnvágin var betri, hevði tað neyvan hent. Men í venjingunum var størri dentur lagdur á start og sovorðið, so hinum mugu vit hyggja at til næstu ferð, greiðir pápi hansara, Eyðbjørn Hansen frá.

Av tí at Ari býr í Føroyum, má pápin fara við honum til Danmarkar, hvørja ferð ein kapping er á skránni, og tí er dreymurin um eina komandi yrkisleið sum kappkoyrari tengd at, um fíggjarligur stuðul fæst til ferðing, útgerð og annað, sum kostar pengar.

– Tíbetur hava vit góðar avtalur við Trygd og Atlantsflog, men vit vildu ynskt, at onkur annar eisini hjálpti til. Vit hava sett okkum í samband við yvir 80 virki og fyritøkur, men bara fingið svar frá tveimum. Møguliga er tað, tí tey ikki kenna til hetta slagið av ítrótti, sigur Eyðbjørn.

– Hevði tað borið til at fingið eina venjingarlegu niðri, so hann fekk fleiri dagar á rað í gocartinum, kundi tað givið honum góða venjing, sum hann ikki kann fáa, sum nú er, og tað hevði munað væl.

Sum er, kappast Ari um sælendska meistaraheitið, sum er nokk so høgligt, tí tá eru allar kappingarnar á Sælandi. Men tá kappast verður um danska meistaraheiti, er talan um trý umfør, sum eru bæði á Sælandi, Jútlandi og Fjóni. Har ætlar Ari sær eisini at vera við, so helst hava vit ikki hoyrt tað síðsta frá honum enn…